# Nýggjur stjóri á Sosialinum

**Regin I. Jakobsen er settur sum fíggjarstjóri á Sosialinum og Miðlavarpinum**

Nevndirnar í Sosialinum og Miðlavarpinum hava gjørt av at seta Regin I. Jakobsen úr Havn í starv sum fíggjarstjóra hjá Sosialinum og Miðlavarpinum.

Soleiðis kemur leiðslan í feløgunum at fevna um tveir stjórar.

Jan Müller, sum hevur verið stjóri á Sosialinum seinastu mongu árini, og sum nú verður forstjóri, sigur, at hetta er náttúrligur liður í menningini av fyritøkuni.

- Frá at hava verið eitt floksblað við avmarkaðum møguleikum hevur Sosialurin seinnu árini ment seg til vera fremsta miðlafyritøkan í landinum. Í fjør vár settu vit Miðlavarpið á stovn, og frá 1. oktober hevur Miðlavarpið rikið Rás2.

- Tí er talan í dag um tvær hampuliga stórar fyritøku, har vit til saman hava fleiri enn 40 fólk í starvi. Hetta setir stór krøv til leiðsluna, og vit hava í eina tíð arbeitt við at styrkja fyrisitingarliga partin. Hinvegin hava vit valt at bíða, til vit fingu fatur á rætta persóninum, og tað meta vit okkum nú hava fingið, sigur Jan Müller.



*Regin I. Jakobsen, í miðjuni, verður stjóri á Rás2 saman við Jonhard Hammer (h.m.) og á Sosialinum saman við Jan Müller (v.m.)*

Regin I. Jakobsen er 42 ára gamal. Hann er útbúgvin cand.merc.aud, og hevur drúgvar royndir innan leiðslu og fíggjarstýring. Hann hevur starvast hjá KPMG (nú SPEKT) sum grannskoðari, verið fíggjarleiðari á ALS og starvast sum deildarleiðari á búskapardeildini hjá Føroya Banka. Seinastu árini hevur hann verið umsitingarstjóri hjá Kaupthing.

Á Sosialinum kemur hann virka sum stjóri saman við Jan Müller, og á Miðlavarpinum verður hann stjóri saman við Jonhard Hammer.

# Stjørnulon í Jøkulstræti

Hósdagin 28. februar skipaði Nærverkið fyri almennari móttøku í nýggja dagtilhaldinum Stjørnulon í Jøkulstræti 4 í Havn.

Undir móttøkuni hildu Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, og Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, røðu, og næmingar úr Tórshavnar Musikkskúla framførdu.

Stjørnulon er eitt dagtilhald fyri minnisveik, sum upprunaliga byrjaði sum royndarverkætlan hjá Alzheimerfelagnum á Dalavegi 4 í Havn.

Sjørnulon heldur til í ovaru hæddini í einum nýggjum bygningi, sum Kiwanis felagsskapurin eigur. Leigaðu hølini eru 167 fermetrar til støddar við tveimum stovum, hvílirúmi, køki, grovkøki, tveimum baðirúmum, ítrivsrúmi og skrivstovu.

Ester Husgaard er leiðari á Stjørnulon, ið hevur pláss til 8 húsfólk, sum eru har í dagtímunum. Á stovninum eru tilsamans fýra starvsfólk.

mg





*Stjórin á Nærverkinum, Mary í Garði, og leiðarin á Stjørnulon, Ester Husgaard*



*Næmingar úr Tórshavnar Musikkskúla framførdu*



*Hans Pauli Strøm landsstýrismaður heldur røðu*

## Andlát og jarðarferðir

**Vanja Seyer Skaalum, í Hvalba**, andaðist mikudagin á Landssjúkrahúsinum, 82 ára gomul. Kistan kemur í Hvalbiar kirkju fríggjakvøldið kl. 21. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Vanju kunnu lata eina gávu til Hvalbiar kirkju.

**Niels Frits Johannesen**, vanliga nevndur Húsa Niels, ættaður av Húsum, búsitandi í Klaksvík, andaðist mikudagin á Sambýlinum í Bøgøtu, 82 ára gamal.

**Kristian Mørkøre**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Oslo, andaðist mikudagin 80 ára gamal.

**Marin Hansen í Nólsoy**, ættað úr Dali, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 77 ára gomul.

## Tøkk



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 7. januar, takki eg hjartaliga.

**Margretha Hansen**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við blómum, uppringingum og gávum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 6. februar 2008.
Ein serlig tøkk til tykkum suðuri á Nesi, sum gjørdu mær dagin so hugnaligan.

**Heilsan**
**Elin Brekkstein**
**Velbastað**

**Dagurin**

**1. mars. Albinus**, deyður ár 550. Abbati og biskupur í Angers í Fraklandi. Varð stutt eftir deyða sín skírdur halgimenni. Navnið merkir hvítur.

**2. mars. Simplicius**, deyður ár 483. Hann var pávi frá 468.

**3. mars. Húngunn**, deyð ár 1003. Føroysk eftirgerð av týska navninum Kunigunde og varð skrivað Kunigunn, tá ið álmanakkin kom á føroyskum. Hon varð gift týska keisaranum Heindrikki II og læt byggja bæði kleystur og kirkjur. Navnið merkir mæt stríðskvinna.